Munnligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg

Svarari: Sólvit Nolsøe, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Møguligar sparingar í Almannaverkinum

Spurningar:

1. Er Almannaverkið í holt við at fremja sparingar ?
2. Um ja hvørjar?
3. Hvørja ávirkan hevur tað á virksemið í Almannaverkinum, at játtanin til Trivnaðartænastur varð skorin á fíggjarlógini við meira enn 5 milliónum kr?

Viðmerkingar:
Í fíggjarlógini fyri 2022 varð ein sparing upp á góðar 5 milliónir kr. gjørd á Trivnaðartænastum í Almannaverkinum. Enn hava vit ikki frætt, hvussu tað ber til at spara hesa upphædd, men neyvan slepst undan at gera sparingar og tillagingar tá ið so stór upphædd skal finnast á einum øki, sum frammanundan er spert.
Tí hesir spurningar til landsstýrismannin, so Løgtingið fær upplýst, hvørjar avleiðingar tað hevur fyri virksemið, at játtanin varð skerd.

Á Løgtingi, 22. mars 2022

Sirið Stenberg